*Til samkomurnar* *18. juni 2016*

**NÚ BYRJAR KOYRINGIN EFTIR BAKVERKI OG VØRUM TIL SUMMARLEGURNAR**

Kæru náðisystkin.
Vit eru ómetaliga takksom fyri, at samkomurnar standa so væl saman um verkið í Zarepta, og fyri tað stóra trúfesti, tit vísa hesum stóra verki. Somuleiðis takka vit tykkum hjartaliga fyri ta góðu undirtøku, tit góvu verkinum við at baka og lata vørur til familjulegurnar, sum nú enda.

Sunnudagin 26. juni byrjar fyrsta summarlegan, tvs. nú byrjar regluliga koyringin eftir vørum til summarlegurnar, har farið verður aftur til at koyra týsdagar norðureftir, mikudagar suðureftir og ávísar hósdagar til Suðuroyar. **Hendan koyring byrjar týsdagin 21. juni og endar 9. august.**

| | | |
|---|---|---|
| **Norðoyggjar:** | *Vøran eigur at vera inni á hesum støðum* ***kl. 10 týsdag****:* | *Á Viðareiði:* ***Saron***<br>*Í Norðdepli:* ***Hermon***<br>*Í Klaksvík:* ***Betesda*** |
| **Eysturoy:** | *Vøran eigur at vera inni á hesum støðum* ***kl. 12 týsdag****:* | *Í Leirvík:* ***Hebron***<br>*Í Fuglafirði:* ***Siloa***<br>*Í Gøtu:* ***Filadelfia***<br>*Í Søldafirði:* ***Elim***<br>*Í Runavík:* ***Berøa***<br>*Á Toftum:* ***Nebo*** |
| | *Til hesi støð í Eysturoynni koyrir bilurin* ***ikki hvørja viku,***<br>***men hesar týsdagar: 28. juni, 12. juli, 26. juli & 9. aug.***<br>*– nevndu dagar eigur vøran at vera inni* ***kl. 12****:* | *Á Skála:* ***Nerija***<br>*Á Eiði:* ***Mizpa*** |
| **Norðstreymoy:** | *Vøran eigur at vera inni á hesum staði* ***kl. 13 týsdag****:* | *Kollafjørður:* ***Zion*** |
| **Suðurstreymoy og Sandoy:** | *Vøran frá* ***Marknagil*** *í Tórshavn,* ***Ebenezer*** *í Tórshavn,* ***Lívdini*** *í Hoyvík,* ***Hebron*** *á Argjum og* ***Zion*** *á Sandi eigur at vera inni á hesum støðum* ***kl. 17.30 mikudag****:* | *Tórshavn:* ***Úti á Fløtum***<br>*Hoyvík:* ***Lonin*** |
| | *Til hetta stað í Suðurstreymoy koyrir bilurin* ***ikki hvørja viku, men hesar mikudagar: 6. juli, 20. juli & 3. august***<br>*– nevndu dagar eigur vøran at vera inni* ***kl. 17.30****:* | *Kaldbak:* ***Nazaret*** |
| **Suðuroy:** | *Til hesi støð í Suðuroynni koyrir bilurin* ***ikki hvørja viku,***<br>***men hesar hósdagar: 30. juni, 21. juli & 4. august***<br>*– nevndu dagar eigur vøran at vera inni* ***kl. 11.30:*** | *Hvalba:* ***Vitnið***<br>*Tvøroyri:* ***Salem***<br>*Porkeri:* ***Betania***<br>*Vágur:* ***Bethel*** |

Vit eru takksom, um tit kunnu skipa soleiðis fyri, at onkur átekur sær at minna á, hvørja ferð, bilurin kemur. Eisini ber til at margfalda brævið, so tey, ið hava áhuga, kunnu fáa eitt eintak.

Tey, sum ynskja at vera við í hesum verki, men eru á staði, har vøra ikki verður avheintað, eru vælkomin at seta seg í samband við okkum, so skipað kann verða fyri flutningi.

Ynskir onkur at lata pening í staðin fyri mat, ber til at flyta peningin inn á konto hjá Zarepta í Bank Nordik: 6460 1566662 og viðmerkja ”til køkin”.

Er okkurt at spyrja um, eru tit vælkomin at ringja til Zarepta á tlf. 332140 ella til onkran av okkum.

*Vegna ZAREPTA*

*Vinarliga,*
*Jens Bech 287840, Kirstin Samuelsen 224256, Heðin Poulsen 258019 og Miriam Rasmussen 589000*